

# Venus fiskað fyri slakar 12 mió krónur í ár

Venus kom á Sørvág tíðliga í morgun, teir landa til Landingarmiðstøðina í Sørvági. Venus byrjaði túr 4. oktober, teir hava roynt á Rygginum, veðrið hevur verið baldrut á túrinum, men teir hava hampuligan túr - um 70-túsund pund, harav 50-túsund er toskur og 13-túsund er svartkalvi. Teir rokna við at selja fyri um 900-túsund krónur hendan túrin. Tað hevur gingið væl hjá Venusi í ár, teir hava gjørt fleiri góðar túrar undir Íslandi, og eisini heilt góðar túrar á Rygginum. Hálvdan Gudmundsen reiðari sigur, at higartil í ár hava teir fiskað fyri slakar 12 mill. kr., tað er hann væl nøgdur við.



FÍGGJARKREPPA

*Orð & myndir*
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*








*Hørður Torfason, sangskrivari og sjónleikari, skipaði fyri einum mótmælisfundi framman fyri Altingið týsdagin*

# Politikararnir siga ikki sannleikan

**Komnir út úr Altingshúsinum, rendi vit okkum beint í ein mótmælisfund á torginum millum Altingið og føroysku sendistovuna**

**Reykjavík:** Hørður Torfason skipaði fyri mótmælisfundinum, men tað er synd at siga, at tað var tann stóra mannfjøldin, sum var møtt upp. Men málið við fundinum var greitt.

- Vit vilja hava David Oddson og hansara harkalið burtur úr Seðlabankanum, segði Hørður Torfason við Sosialin og Rás2.

Hørður Torfason er sjónleikari og sangskrivari, men tað vóru kortini eingir protestsangir sungnir hesa løtuna framan fyri Altinginum – og føroysku sendistovuni.

- Vit eru í svárari fíggjarligari kreppu, men vit fáa einki at vita frá stjórnini. Hesir menninir hava komið okkum í hesa støðuna, og vit vilja halda teir ábyrgdaðar fyri tað. Og fyrsta stigið er at leggja frá sær, segði Hørður Torfason.

Hann viðgongur, at alt Ísland hevur riðið við á hestinum, men hann heldur, at stjórnin og tjóðbankin áttu at haft ansað betri eftir, so alt ikki endaði, sum tað nú er endað.

- Eg veit ikki, hvat teir skuldu havt gjørt, eg eri ikki politikari, men bara ein maður, sum býr í Íslandi. Men vit hava valt hesar menn við teirra vitan og til at hava ábyrgd av okkum og íslendsku tjóðini, men teir taka skeivar avgerðir ferð eftir ferð, sigur Hørður Torfason.

## Vil vita hvat hendir

Hann dugir ikki í løtuni at siga nakað um, hvussu svára fíggjarliga kreppan fer at ávirka íslendingar.

- Sum eg havi skilt, so hava vit mist nógvar pengar, men tað er ikki tí eg standi her og mótmæli. Men eitt skrædl kann koma, og tí er tað, at vit vilja hava at vita, hvat tað er sum hendir, sigur Hørður Torfason.

Hann heldur snøgt sagt, at politikararnir og teir, ið sita á kassanum, ikki siga fólkinum sannleikan.

- Vit vilja hava sannleikan at vita. Erligheit. Øll fólk, tú tosar við, siga tað sama. Eingin veit, hvat gongur fyri seg. Men bankarnir eru næstan farnir á heysin, sigur Hørður Torfason.

Hann er onga løtu í iva um, at sovæl politikarar sum bankafólk eru fullgreið yvir, hvat tað er, sum hendir, men at hesi fólkini bara ikki vilja út við tí.

Synd er annars at siga, at mótmælisfundurin seinnapartin í gjár hevði stóra undirtøku.

- Nei, tað má eg viðganga. Tað er, sum um tjóðin svevur, sum fólk sova. Men eg rokni við, at tey fara at vakna fyrst í komandi mánað, tá lønirnar koma. Eg vóni, at eg taki feil, men innast inni veit eg, at soleiðis verður. Eg síggi grannarnar hjá mær byrja at flyta út, teir hava mist húsini, og tað er eingin góð leið at ganga, segði Hørður Torfason.

Hann væntar, at fyrst fara at vakna við kaldan dreym, og tá fáa vit reaktiónina at síggja.